## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av eystri, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av landnyrðingi. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið Ólavsøkuaftan og Ólavsøkudag:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, Ólavsøkudag minni vindur. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 8 og 12 stig.

# Sterk gospelrødd á Summar Festivalin

**Heine Lützen telist millum landsins bestu gospelsangarar, og nú skal hann syngja á Summar Festivalinum fyri fyrstu ferð**

**TÓNLEIKUR**
*tíðindaskriv*

Hann er landskendur sum ein framúr góður gospelsangari, og hansara fjølbroytti og hugtakandi gospeltónleikur hevur verið nógv at hoyrt millum føroyingar. Nú skal Heine Lützen syngja á Summar Festivalnum fyri fyrstu ferð. Hann fer at hava konsert Vágsbøi seinnapartin leygardagin 4. august.

Tað eru liðin meira enn 20 ár, síðani Heine Lützen var við til fyrstu upptøkurnar hjá sær sum gospelsangari, og tá ið hann nakað seinni var við til útgávuna hjá Samsint, kom hann av álvara fram í ljósið. Seinnu árini er Heine meira kendur sum solistur, og hann hevur givið tvær frálíkar fløgur út, sum fólk hava tikið sera væl ímóti.

Heine hevur bólk við sær á Summar Festivalin, og teir fara at spæla popputan rock. Teir hava gjørt sínar egnu útsetingar av onkrum sálmum, og sjálvandi verða onkrir av teimum sangunum, sum Heine hevur verið nógv frammi við, eisini at hoyra á konsertini.

Í bólkinum hjá Heina Lützen spæla Jónsvein Heinesen (keyboards), Gunnar Guttesen (trummur), Sven Aage Drewsen (bass) og Rúni Eysturlíð (gittar).



*Tað verður frálíka gospel-røddin hjá Heina Lützen, sum fer at ljóma á Vágsbøi leygardagin, tá Summar Festivalurin verður um knappar tvær vikur*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 12 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 35 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 37 |
| Malta | 36 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 27 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 7 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 987 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer eystureftir og brúgvalagið haðani kemur hendavegin.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani nærkast Føroyum hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/7 kl. 06[00] – 23/7. 06[00]. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. 06[00]– 2/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 28,0 mm

## Ólavsøkan 2007

- alið eitt tiltak miðlahúsinum

**Fríggjadagur 27. juli**
*kl. 15-20 framsýning við skemtitekningum hjá Óla P*

*kl. 15-20 filmsfyrivísan torvfilmurin ”Burtur á Heiði” og BBC filmur frá 1966 ”Islands in the Clouds” verða vístir.*

*kl. 15-17 bókaframløga ”Føroya Mál á manna munni – móðurmálið og málrøkt” eftir André Niclasen.*

*Spælimenninir spæla í Miðlagarðinum*

**Leygardagur 28. juli**
*kl. 14-20 framsýning við skemtitekningum hjá Óla P*

*filmsfyrivísan torvfilmurin ”Burtur á Heiði” og BBC filmur frá 1966 ”Islands in the Clouds” verða vístir.*

*kl. 18 spælir og undirheldur Eid Spelemannslag*

*konsert við Elin Heinesen.*

**Sunnudagur 29. juli**
*kl. 14-20 framsýning við skemtitekningum hjá Óla P*

*filmsfyrivísan torvfilmurin ”Burtur á Heiði” og BBC filmur frá 1966 ”Islands in the Clouds” verða vístir.*

*kl. 14 spælir og undirheldur Eid Spelemannslag*

*kl. 16 framløgukonsert við Hogna Reistrup*

*kl. 22.15-23 konsert við Sigrid Rasmussen*

## VESTFALLSKYRRINDI

22. juli Fyrra kvarter
Mánin longst frá jørðini
30. juli Fullmáni
4. august Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. Juli | 03.03 | 15.25 | 02.03 | 14.25 | 02.18 | 14.40 | 05.03 | 17.25 | 06.03 | 18.25 | 01.18 | 13.40 | 00.18 | 12.40 | 03.18 | 15.40 | 04.18 | 16.40 | 02.48 | 15.10 | 04.03 | 16.25 |
| 25. Juli | 03.48 | 16.11 | 02.48 | 15.11 | 03.03 | 15.26 | 05.48 | 18.11 | 06.48 | 19.11 | 02.03 | 14.26 | 01.03 | 13.26 | 04.03 | 16.26 | 05.03 | 17.26 | 03.33 | 15.56 | 04.48 | 17.11 |
| 26. Juli | 04.35 | 16.59 | 03.35 | 15.59 | 03.50 | 16.14 | 06.35 | 18.59 | 07.35 | 19.59 | 02.50 | 15.14 | 01.50 | 14.14 | 04.50 | 17.14 | 05.50 | 18.14 | 04.20 | 16.44 | 05.35 | 17.59 |
| 27. Juli | 05.24 | 17.49 | 04.24 | 16.49 | 04.39 | 17.04 | 07.24 | 19.49 | 08.24 | 20.49 | 03.39 | 16.04 | 02.39 | 15.04 | 05.39 | 18.04 | 06.39 | 19.04 | 05.09 | 17.34 | 06.24 | 18.49 |
| 28. Juli | 06.14 | 18.36 | 05.14 | 17.36 | 05.29 | 17.51 | 08.14 | 20.36 | 09.14 | 21.36 | 04.29 | 16.51 | 03.29 | 15.51 | 06.29 | 18.51 | 07.29 | 19.51 | 05.59 | 18.21 | 07.14 | 19.36 |